10 nýggj ES limalond:

# ES avloysir nationalstatin



*– Sum gongdin hevur verið, tykist ES felagsskapurin við árunum at mennast og styrkjast, inntil komið er á mál við einum savnaðum Europa, ikki minst við nýggju grundlógini, sum er á veg, sigur Hákun Djurhuus, føroyskur sendimaður í ES háboringini í Bruxelles*

**Leygardagin 1.mai fáa 10 nýggj lond ES limaskap. Sostatt hevur Europasamveldið nú ment seg til 25 lond við tilsamans 450 milliónum íbúgvum, og henda gongd reisir spurningin, hvat ES í framtíðini kann mennast til. – Fyri Føroyar merkir ES víðkanin í fyrstu atløgu, at Føroyar gerast partur av einum nógv størri marknaði við nýggjum føroyskum útflutningsmøguleiku m, sigur Hákun Djurhuus, føroyskur sendimaður í ES háborgini í Bruxelles**

ES
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Frá 15 londum verður ES felagsskapurin nú víðkaður til 25 lond. Estland, Letland, Litava, Kekkia, Pólland, Malta, Kypros, Ungarn, Slovenia og Slovakia eru nýggju londini við ES limaskapi, og sostatt eru leivdirnar við politiska og landafrøðiliga býtinum eftir seinna heimsbardaga nú endaliga horvnar í eini nýggjum, integreraðum og savnaðum Europa.

Alsamt vaksandi Europasamveldið er tí av tveimum orsøkum sera viðkomandi fyri Føroyar í hesum døgum. Fyrsta orsøkin er, at víðkaði ES marknaðurin við 10 nýggjum limalondum afturat gevur føroysku útflutningsvinnuni nýggjar møguleikar og avbjóðingar, og hin orsøkin er, at ein nýggj ES grundlóg er á veg, sum kann fáa stórar ríkisrættarligar avleiðingar fyri Føroyar, um Danmark tekur undir við hesi lóg.

– Gamla býtið undir kalda krígnum við jarntjaldinum og Eystureuropa kontra Vestureuropa er við ES víðkanini nú endaliga horvið við støði í europeisku samansjóðingini, sigur Hákun Djurhuus, sum av Føroya Landsstýri er settur at røkja føroysk áhugamál í ES høpi. Saman við donskum og grønlendskum sendimonnum arbeiðir føroyski sendiharrin í ES háborgini í Bruxelles.

### Nýggir útflutningsmøguleikar

Hákun Djurhuus vísir á, at ES víðkanin leygardagin 1. mai eisini fer at ávirka føroysk viðurskifti.

– Við 10 nýggjum londum er talan fyrst og fremst um ein nógv størri ES marknað, og hetta økir um føroysku útflutningsmøguleikarnar, heldur Hákun Djurhuus. Hann vísir á, at handilssáttmálin, Føroyar hevur við ES, nú eisini víðkast, og á henda hátt hevur føroyska útflutningsvinnan størri møguleikar enn áður.

– Føroyar hava fyrr roynt at fingið handilssmáttmálar í lag við nøkur av teimum londum, sum nú gerast limir í ES, og um vinnan hevur eyguni opin fyri nýggjum møguleikum, kann ein størri og fjølbroyttari ES marknaðurin fáa positivar avleiðingar fyri føroyskan útflutning og harvið eisini samlaða búskapin, heldur Hákun Djurhuus, sendimaður í Bruxelles.

Hann sigur seg vera sannførdan um, at føroyska vinnan er nóg dugnalig at finna og gagnnýta nýggju vegirnar og møguleikarnar, og sostatt økist føroyski útflutningsvinningurin.

### ES grundlóg á veg

Andstøðuleiðarin Høgni Hoydal hevur júst sent løgmanni skrivligar fyrispurningar um, hvørjar ríkisrættarligar avleðingar tað kann fáa fyri Føroayr, um danir taka undir við nýggjari felags ES grundlóg, sum er á veg og møguliga verður samtykt longu í juni. Um danir taka undir við ES grundlógini og harvið útdelegera málsøki til ES, er møguleiki fyri, at føroysk málsøki á donskum hondum verða flutt úr Keypmannahavn til Bruxelles at umsita (lesið meiri um hetta í viðtalu við løgmann á næstu síðu).

Í hesum sambandi hevur ein felags grundlóg fyri øll ES lond verið besta og mest sjónliga dømi um, hvønn veg tað kann bera, men higartil er ES grundlógin ikki samtykt.

– Undir kreppuni á Balkan og í Irak hevur ES verið í tvíningum og ikki kunnað handlað, og ein partur av hugsanini við eini felags grundlóg er at forða fyri slíkum, vísir Hákun Djurhuus á. ES grundlógin er ikki góðtikin enn, og í løtuni fara tingingar fram millum limalondini. Hetta avdúkar sambært føroyska sendimanninum í Bruxelles, at vilji er til staðar fyri eini europeiskari grundlóg, sum skal vera galdandi fyri øll limalondini.

– Henda grundlógin skal ikki loysa grundlógirnar av í hvørjum ES landi sær, men heldur skal hon virka við síðuna av hinum, greiðir Hákun Djurhuus frá.

Nýggja ES grundlógin hevur verið ógvuliga nógv umstrídd, og meðan ES stuðlar síggja grundlógina sum enn eitt fet móti einum savnaðum Europa, ávara mótstøðumenn móti hesum sama.

– Grundlógin og samlaða gongdin og menningin í Europasamveldinum er eitt ógvuliga viðkvæmt politiskt evni, men sum gongdin hevur verið, tykist ES felagsskapurin við árunum at mennast og styrkjast, inntil komið er á mál við einum savnaðum Europa.

### Nationalstaturin í vanda

Hákun Djurhuus vil ikki gera viðmerkingar til sína persónligu áskoðan um menningina av ES, men við støði í gongdini og menningini av ES, har nationalstatirnir útdelegera fleiri og fleiri málsøkið frá sær til ES, vísir hann ikki aftur, at endin kann verða ein savnað europeisk tjóð, á sama hátt sum vit kenna skipanina í USA.

- Hetta er tó sera toført at spáa um, tí fyrst og fremst liggur ein stór avbjóðing í ES fyri framman at fáa víðkanina at fungera, sigur Hákun Djurhuus. Eitt annað viðkomandi mál í altjóða politikki í løtuni er stríðið móti yvirgangi, sum ES í størri mun vil gera seg galdandi í.

– Nú koma 25 ES lond at standa saman í t.d. stríðnum móti yvirgangi, og við integratiónini og sameiningini av Eystur- og Vestureuropa kann hetta elva til øktan stabilitet, frið og vælferð í Europa, men samstundis vera nýggir spurningar at taka støðu til fyri ES, sigur Hákun Djurhuus.

Hann nevnir í hesum sambandi, at við 10 nýggjum tjóðum, sum í størstan mun koma úr Eystureuropa, skal ES nú taka hædd fyri nýggjum fyrisitingarligum bygnaði og mentanarligum og búskaparligum viðurskiftum, og av hesum kann savningin av Europa ikki fara fram uttan nakað hóvasták.



Løgmaður til Christiansborg:

# ES grundlógin til umrøðu

**Fyrrapartin hósmorgun fór Føroya løgmaður til Danmarkar til fakligt kjak á Christiansborg um ES grundlógina, sum Danmark eftir øllum at døma verður partur av. Fokus verður sett á ríkisrættarligu avleiðingarnar fyri Føroyar og Grønland, um danir í framtíðini flyta síni málsøki úr Keypmannahavn til Bruxelles**

ES
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*– ES grundlógin, sum nú er í umbúna, er eitt ógvuliga týdningarmikið mál fyri føroysku tjóðina, og tískil skulu vit á allan hátt avgera okkara støðu í kjalarvørrinum av europeisku integratiónsgongdini, sigur løgmaður, sum hósmorgunin fór til kjak á Christiansborg um ES*

Eftir skrivligan fyrispurning frá andstøðuleiðaranum Høgna Hoydal er Jóannes Eidesgaard løgmaður farin til Danmarkar til kjak á Christiansborg um eina komandi ES grundlóg, sum danir eftir øllum at døma verða partur av. Talan er ikki um politiskar samráðingar men fyrilestrar og hoyringar um eina komandi ES grundlóg. Jóannes Eidesgaard er bjóðaður við til kjakið við serligum atliti til evnið, »hvordan påvirkes en eventuel EU grundlov rigsfællesskabet«, og við hesum heiti skulu ovastu myndugleikar føroyinga og grønlendinga halda fyrilestrar um ríkisrættarligu avleiðingarnar av ES grundlógini.

### Føroyingar avgera sjálvir

Jóannes Eidesgaard undirstrikar, at vit enn eru í fyrsta fasu, har hol verður sett á orðaskiftið um møguligar avleiðingar av eini møguligari ES grundlóg, sum Danmark sambært honum helst tekur undir við.

– Tað er alt ov tíðliga at siga nakað um ítøkiligar avleiðingar, men nú fari eg til Danmarkar at fáa eina heildarfatan av, hvørjir møguleikar og avleiðingar talan kann gerast um, tá ein ES grundlóg einaferð verður veruleiki, sigur løgmaður. Samstundis heitir hann á føroyskar politikarar at brynja seg til kjakið um ES, sum skal takast upp í næstum.

Danska tjóðin er eftirhondini rættiliga innarlaga í ES samstarvinum, og sambært løgmanni er sannlíkt, at danir taka undir við nógv umrøddu og ikki minst umstríddu ES grundlógini. Um danir velja at flyta nøkur av sínum málsøkjum til ES háborgina í Bruxelles at umsita, samstundis sum danska stjórnin eisini umsitir fleiri týdningarmikil føroysk málsøkið, kann hetta fáa ógvusligar avleiðingar fyri Føroyar.

Mong bera ótta fyri, at føroysk málsøki – uttan at føroyingar verða spurdir – automatiskt skulu umsitast av ES í Bruxelles, og tjóðveldisformaðurin hevur m.a. sagt, at vit á henda hátt kunnu verða drigin inn gjøgnum ES bakdyrnar. Men løgmaður er ikki samdur við hesum.

– Eg vil fegin undirstrika, at vit føroyingar sjálvir skulu avgera, hvussu verður við teimum málum, sum viðkoma okkum, um danir útdelegera part av sínum málsøkjum til Bruxelles, og tað merkir á ong-an hátt, at vit eisini verða partur av hesum, slær løgmaður fast. Spurdur, á hvønn hátt vit kunnu fyribyrgja at verða drigin við uttan nakran avgerarrætt, hevur løgmaður bæði beinini á jørðini.

– Støðan er als ikki, at vit antin yvirtaka øll málsøki, ella at føroysk mál skulu umsitast í ES. Møguleikarnir eru fleiri, og tað er hetta, føroyski myndugleikin nú skal í holt at viðgera og ogna sær innlit í, sigur løgmaður, sum ikki vil koma nærri inn á, hvørjir aðrir møguleikar eru.

Sambært Jóannesi Eidesgaard er talan framvegis um sera ógreið viðurskifti, eisini tí danska stjórnin framvegis ikki hevur almannakunngjørt sínar ætlanir, og tískil er ov tíðliga at staðfesta nakað.

– Tað er týdningarmikið, at vit ikki leypa millumfasurnar um og beinanvegin gera niðurstøður um, hvussu framtíðin fer at síggja út fyri okkum, undirstrikar løgmaður.

### Samráðingar á veg

Jóannes Eidesgaard vísir á, at eftir orðaskifti í Føroyum verða samráðingar helst tiknar upp við donsku stjórnina um okkara leiklut í eini nýggjari ES grundlóg, og hann óttast ikki eina løtu, at føroyingar ikki sjálvir skulu koma til orðanna.

– Tað er klárt, at hetta er eitt ógvuliga týdningarmikið mál fyri føroysku tjóðina, og tískil skulu vit á allan hátt avgerða okkara støðu í kjalarvørrinum av europeisku integratiónsgongdini, serliga nú nýggj grundlóg er í umbúna, sigur løgmaður. Hann undirstrikar, at vit framvegis eru á fyrsta stigi, har allir møguleikar skulu leggjast á borðið, og við hesum útgangsstøði skulu vit taka støðu til, bæði innanhýsis og saman við donsku stjórnini, hvør leiklutur okkara verður, og hvat verður av donsku málsøkjunum, sum viðkoma okkum.